# Nøvn

## Føðingar



*Tann 21. novembur 2010 fekk Pætur hesa fittu idduna, sum eitur Brá. Hon vigaði 3210 gr og var 51 cm long. Foreldur hennara eru Ragnhild Ellingsgaard, Klaksvík og Bárður Juul Arge Jacobsen, Argir.*

18. mars fingu Ruth m. Garðarnar og Magnus Berg, Hvalba, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4020 gr.

29. mars fingu Svanna Hammer og Øssur Thomsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4550 gr.

29. mars fingu Fríðhild og Hanni Højgaard, Saltnesi, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3650 gr.

30. mars fingu Linda Jacobsen og Bjartur Fríði Clementsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4185 gr.

31. mars fekk Durita Henriksen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 4000 gr.

31. mars fingu Marin og Kristian R. Bláberg, Miðvági, eina dóttur. Hon var 59 cm long og vigaði 4750 gr.

1. apríl fingu Hanna og Sigurð Vang, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3170 gr.

3. apríl fingu Nanna og Bárður Bjarnarson, Skálavík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

4. apríl fingu Anita Vilhelmsen og Høgni Johansen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3320 gr.

4. apríl fingu Súsanna og Jákup Súni Hansen, Kollafirði, ein son. Hann var 55 cm long og vigaði 4150 gr.

5. apríl fingu Malan og Øssur Steinhólm, Leirvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 5000 gr.

5. apríl fingu Maibritt og Ragnar í Haraldstovu, Sørvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4620 gr.

6. apríl fingu Anja og Esbern Lervig, Saltangará, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

# Til minnis um Eddu Gaard



Tað fellur okkum sera tungt at skriva minningarorð um Eddu, hóast tað ikki var heilt óvæntað, at hon fór nú. Sjálvt um vit hava vitað, at hon tey seinastu næstan 14 árini var sjúk, var hon kortini so positiv, at vit illa kundu trúgva, at hon var so sjúk sum hon veruliga var.

Edda var fødd í Porkeri 13. februar 1946 og giftist við John Gaard úr Fámjin. Tey búsettust í Vági og fingu 4 børn.

Í næstan 45 ár vóru vit regluliga saman í bindiklubba og tey seinnu árini eisini nógvar góðar túrar runt í Føroyum og eisini uttanlands. Edda var sera áhugað í at síggja sum mest av Føroyum og vit vóru eisini nógva staðni, men Kalsoynna náddu vit ikki, tað var ætlanin at fara hagar komandi summar.

Edda hevði sera gott minni og sjáldsom evni at kenna fólk aftur. Hon ferðaðist niður til viðgerð, tey seinastu árini umleið aðruhvørja viku, og kom tí við sínum opna sinni og verumáta at kenna nógv fólk, og tí var tað mangan hugstoytt hjá henni, tá nógv av hesum fólkum, ið hon kom í samband við á Hotel Tórshavn, knappliga ikki vóru ímillum okkum longur.

Tá hon hevði roynt allar viðgerðir móti krabbameini, og tað vísti seg, at hon ikki kundi fáa meira hjálp, var hon eisini fús at vera við í royndarviðgerð. Hóast hon ikki fekk nakra nyttu av tí sjálv, so helt hon, at tað seinni kundi verða øðrum at gagni. Øll hesi árini var systkinabarnið Malena við henni og var tað henni til stóra hjálp og troyst.

Edda var sera familjukær og royndi so vítt sjúkan loyvdi tí at vera við til allar merkisdagar, bæði í familjuni hjá sær og hjá John.

Hon møtti trúliga upp, tá bindiklubbur var, hóast tað var greitt fyri okkum øllum, hvussu sjúk hon var. Húðin var so illa farin av viðgerðunum, at hon ofta mátti vera í hanskum, tá hon bant, men kortini sat hon ikki fyri einki. Hon bant turrikløð við holfaldi til alla familjuna, bæði í Danmark og Týsklandi og helt fyri, tá hon bant tað seinasta, at ikki var vist, at hon náddi at fáa tað liðugt. Eitt hava vit allar lært av henni: Vit hava onga orsøk til at grenja um smáting, ið vit kortini ikki kunnu gera nakað við.

Seinastu ferð, vit allar vóru saman, var stutt frammanundan jólum, tá hon hevði skipað fyri, at vit skuldu hava okkara árliga jólaborðhald, og høvdu vit eitt sera hugnaligt kvøld saman.

Nú bindiklubberin er byrjaður aftur, merkja vit rættiliga saknin, men størstur man saknurin vera hjá tykkum John, Majken, Mannbjørn, Birnu og Birgir og ikki minst hjá ommubørnunum, sum hon hevði so stóra gleði av, og tey av henni.

**Bindiklubburin**

## Merkisdagar

### Diamantbrúdleyp

Leygardagin 9. apríl 2011 kunnu hjúnini Margit og Thórmundur Joensen á Nesi hátíðarhalda 60 ára brúðleypsdag. Dagurin verður hildin á Vesturskin frá kl. 15.00 til 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 7. mai halda vit, Valborg og Kári Kjelnæs, Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Lorvík ll. 19.00 Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá innan hósdagin 28. apríl á tlf. 455644 ella tlf. 256000 ella á *kkksls@olivant.fo*

### Brúdleyp

Leygardagin 9.4.11 giftast Sunrid Lamhauge, Rituvík og Røgvi Fossdalsá, av Nesi. Vígslan verður í Nes kirkju kl 14.00. Dagurin verður hildin fyri innbodnum.

### Brúdleyp

Leygardagin 9. apríl kl. 13 giftast í Kvívíkar kirkju, Jacoba Vang, Leirvík og Leif Sjúrður Petersen, Leynar. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30.

### Silvurbrúdleyp

Mánadagin 11. apríl hava hjúnini Sigrid og Tórhallur Gaardbo, Søldarfirði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 16. apríl á Sjócafe'ini við brunch frá 10.00 til 14.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum hendan dagin, verða vinarliga biðin um at siga frá við at ringja ella sms'a á 25 38 06 ella 44 17 56, í seinasta lagi sunnudagin 10. apríl.

### 60 ára føðingardagur

Sunnudagin 10. apríl verður Eyðgerð Abrahamsen, Fuglafjørður 60 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.